


# Martin Luther

Trúbótin/Trúarskiftið

# Trúarskiftið

- Reformatión = endurnýggjan/broyting
- Elstu skriftir eru myndir á holuveggjum
- So við og við koma tekn fyri myndirnar
- Fyrstu bøkurnar skrivaðar við hond
- Miðskeiðis í 1400-talinum stórt frambrot – prenta bøkur
- Bíbliur fyrstu bøkur, sum komu út
- Ikki samsvar millum tað, sum stóð í Bíbliuni og tað, sum kirkjan lærdi



# Johan Huss

- Føddur í Kekkia í 1370
- Fátækur
- Las gudfrøði
- Talaði at kirkjulæruni
- Ákærdur og dømdur = brenna á báli
- Doyði 1415



# Munurin á Martin og Martin:

**Martin Luther 1483-1546**



**Martin Luther King 1929-1968**



# Uppvøkstur

- Føddur í Eisleben (Suður-týskland) 10 nov. 1483
- Flyta, tá ið Luther er 1 ára gamal
- Hørð uppvenjing
- Foreldrini sera gudrøkin
- Pápin vinnur sær pening





# Skúlin

- Strangari enn heima
- Martin óttafullur
- Í latínskúla 15 ára gamal
- Sang í túnum fyri at vinna sær nøkur oyru
- Ríkmanskona hugtikin - tók hann til sín
- Góð kor og dugnaligur næmingur

# Munkur

- Faðirin segði løgfrøði
- Gerst sjúkur
- Ræðist deyðan
- Gerst munkur av olmussu
- Royndi at finna frið í sálini í kleystrinum
- Bað, fastaði og arbeiddi tyngsta arbeiði
- Gamal munkur sigur honum um syndanna fyrigeving





# Munkur

- Munkalyfti:
  - Einki at eiga
  - Vera lýdnir móti kleysturreglunum
  - Ikki gifta seg

  - Áminning: tríggjar knútar á beltið um miðjuna

# Halgimenni

- Halgimenni er eitt fólk, sum eftir deyða sín verður hildið at hava livað serliga fyrimyndarliga ella heilagt.
- Sankta Anna var Maria, mamma Jesus
    - Fyri trúbótina var hon verndarhalgimenni, eisini í ódnarveðri



# Wittenberg

- Flytur úr Erfurt til Wittenberg
- Prestur
  og professari á lærda háskúlanum
- Dugir væl at halda fyrilestrar
- 1511 varð hann sendur til Róm
- Vónbrot



# Avlátshandil

- Leo pávi hin tíggjundi setti avlátshandil í verk, meðan Luther var í Wittenberg
- Honum tørvaði pening til Pæturkirkjuna í Róm
- Johan Tetzel var munkur. Segði við avlátsbrøvum sluppu fólk undan:
    - Kirkjuligum revsingum
    - Stytta um tíðina í reinsunareldinum
    - Góvu fyrigeving fyri syndir



# Avlátshandil

- Luther er ímóti
- Sló 95 setningar í kirkjudyrnar í Wittenberg í 1517
- T.d. Nr 36: *Øll kristin,*
  *sum iðra seg um syndir sínar, fáa fyrigeving, eisini uttan avlátsbræv*
- Spjaðast skjótt um alt Týskland






# Álop á pávaveldið

- Ikki ætlan Luthers at leypa á pávaveldið
- Mótstøðan ger, at hann fer frá katólsku kirkjuni
- Finst at:
  - Avlátsbrøvum
  - Tilbiðjan av halgimennum
  - Kleysturlæruni
  - Læruni um reinsunareldin

# Pávin

- Pávin lýsti Luther at vera trúarvilling
- Lýsti hann í bann – ikki loyvi at taka lut í kirkjuligum handlingum
- Luther nógvar viðhaldsmenn
- Pávin fær ikki skatt hann



# Luther í Worms






- 1521 í Worms. Fyrsti ríkisdagur hjá nýggja keisaranum
- Verður spurdur, tá ið hann kemur, um hann tók orðini aftur, sum stóðu í ritunum
- Segði nei eftir umhugsingartíð

# Wartburg

- Keisarin læt Luther døma friðleysan í týska ríkinum
- Fríðrikur hin Vísi hevði grunað, hvussu fór at ganga og sendi menn eftir Lutheri
- Tóku Luther til fjallaborgina Wartburg
- Búði har eitt ár undir øðrum navni
- Skrivaði nógv ímeðan
- Týddi NT til týskt



# Wittenberg

- Summir trúarfelagar Luthers fóru harðliga fram ímóti katólsku prestunum
- Herjaðu inn í kirkjurnar við knívi, skræddu halgimyndir niður, rivu messubøkur sundur, róku prestarnar út
- Luther fór at sissa ófriðarkropparnar






# Trúbótin




- Komandi árini varð trúbótin sett í verk í Saksen
- Latínska messan avtikin
- Prædikað varð á móðurmálinum
- Altargongdin broytt, so gestirnir fingu bæði vín og breyð
- Kleystrini vórðu afturlatin
- Prestarnir sluppu at gifta seg
- Luther gifti seg við einari fyrrverandi nunnu
- Yrkti fleiri sálmar
- Legði stóran dent á sálmasang

# Trúbótin

- Verður sett í verk í norðanlondum og týskum londum
- Luther helt, at
  kirkjan sjálv skuldi stjórna kirkjuni við at velja prestar, bispar o.a
- Tíðin var ikki búgvin -
  kongar og fúrstar vórðu neyðbispar
- Kongarnir og fúrstarnir gingu á odda fyri trúbótini,
  sum teir hildu vera neyðuga,
  men eisini tí teir vildu hava fatur í ríka kirkjugóðsinum



# Augsburgska trúarjáttanin

- Lýsir høvuðssjónarmiðini í luthersku læruni
- Katekismus, sum er skrivað til skúlabrúk, er ein hin dýrmætasta lærubókin í luthersku kirkjuni
- Martin Luther doyði í 1546



# Læran

- Læran í evangelisk luthersku kirkjuni byggir fyrst og fremst á Bíbliuna
- Játtanarskriftirnar og Katekismus eru vegleiðingar
- Lærusetningar og kirkjusiðir skulu samsvara við Bíbliunnar læru
- Ymisk fatan av Bíbliuni í evangelisk luthersku kirkjuni
- Dentur lagdur á, at skriftirnar verða granskaðar
- Prestur skal hava gudfrøðiliga útbúgving



# Lóg og evangelium

- Skilnaður millum lóg og evangelium
- Lógin eru tey 10 boðini og onnur lyfti, Bíblian gevur
- Jesus doyði á krossinum fyri okkara syndir - vit verða fyrigivin fyri syndir okkara, tí Jesus hevur við deyða sínum uppfylt lógina fyri menniskju








# Jesu lív

- Jesu lív stóran týdning
- Guðs sonur og frelsari
- Orð og gerningar vísa, at hann er sonur Guðs
- Jesus:
  - Ferðaðist
  - Prædikaði
  - Grøddi
  - Hjálpti neyðstøddum



# Jesu lív

- Krossfestur
- Reis upp frá deyða -
  vann sigur á deyðanum

# Guð





- Kirkjan lærir okkum um tríeindina
  - Guð
  - Jesus
  - Heilagan Anda

# Guð




- Jesus var sostatt Guð eisini, tá ið hann livdi sum menniskja
- Guð er kærleiksfullur og náðigur
- Ofraði son sín fyri menniskjuni
- Tað er bert ein Guð sambært kirkjuni



# Luther

- Menniskju verða frelst við at hoyra orðið og trúgva tí
- Ósamdur við katólsku kirkjuni, sum sigur, at góðar gerðir hava týdning fyri frelsu
- Luther sigur, at menniskju eru fødd í synd
- Eru trælir syndanna og kunnu ikki slíta seg leys
- Verður føtt av nýggjum, tí Heilagi Andin arbeiðir í menniskjum - frelsan er Guðs æra
- Himmal og helviti eru til
- Vil menniskjað ikki hava nakað við Guð at gera, verður tað glatað
- Guð ynskir, at øll verða frelst
- Uppreisnin stóran týdning - trúgvandi rísa, sum Jesus, upp

# Trúarjáttan og sakramentini

- Tá ið menniskju doyggja, skulu tey rísa upp aftur, sambært apostólsku trúarjáttanini
    - Hann skal turka hvørt tár av eygum teirra; deyðin skal ikki vera longur, og hvørki sorg, skríggj ella pína skal vera longur - tí hitt fyrra er farið.
- Æviga lívið er eitt gott lív við Guði sambært NT
- Tvey sakramenti eru: dópur og altarborð
- Eitt sakramenti er ein gerð, sum Kristus hevur innsett, har Guð gevur eina ósjónliga náði við einum sjónligum tekni





# Dópur

- Tú verður limur í fólkakirkjuni við at doypa teg
- Dópurin er Guðs gáva
- Verður føddur av nýggjum
- Hevur bert týdning, um barnið verður lært upp í tí kristna barnalærdóminum og trýr á Guð
- Doypt verður í navni Faðirsins, Sonarins og Heilaga Andans
- Uttan Guðs orð er vatnið bert vatn sambært Luther

# Altargongd



- Er innsett av Jesusi sjálvum skírisdag
- Til minnis um Jesu deyða - syndanna fyrigeving
- Breyðið = Jesu likam
- Vínið = Jesu blóð
- Øll,
  sum fara til altars, fáa breyð og vín

# Kirkjan

- Er eitt heilagt samfelag fyri øll menniskju
- Uppgáva kirkjunnar er
  at prædika og útinna sakramentini
- Bispur er hægstur
- Dómpróstur er næsthægstur
- So koma prestarnir
- Prestur tekur sær vanliga
  av gudstænastuni og útinnir sakramentini
- Er hirði í samkomuni



# Kirkjuráð

- Hvør kirkja hevur eitt kirkjuráð
- Verður valt fjórða hvørt ár
- Hevur ábyrgd av peningaligu viðurskiftunum
- Velur dekn, klokkara og organist
- Innstillar umsøkjarar til prestastarvið
- Góðkenna ritual og lærubøkur
- Í minsta lagi 6 limir + ein lim eyka fyri hvørjar 1000 íbúgvar



# Trúarskiftið í Føroyum

- Ongar skrivligar keldur
- 1537 kemur trúbótin til Noregs
- Evangeliska lutherska kirkjan innførd í Føroyum í 1539
- Lutherskir prestar settir í Føroyum í 1541
- Fyrsti lutherski biskupur var Jens Gregersen Riber
- Katólskir siðir liva enn:
  - Signing
  - Messur
  - Vøkur



